Nr. 124- 1. ju1i 2008

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Summartónar halda fram



**Vikulangi tónleikafestivalurin Summartónar heldur fram og fleiri konsertir eru á skránni mikudagin**

SUMMARTÓNAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Klokkan 16 mikudagin 2. juni spæla Rebecca Persson (sopran) og Birgitte Schnakenburg (klaver) í Listaskálanum í Havn. Skráin er hin sama, sum týskvøldið í Trongisvági.

Klokkan 19:30 er konsert í Norðurlandahúsinum við Marselis Kvartetten. Todd Cadieux leikar 1. violin, Erik Søndergaard Jensen, 2. violin, Lise Pehrson, bratsj, og Michael Gottschalk leikar cello.

Fleiri frumframførslur eru á skránni, m.a. eitt verk eftir Edvard N. Debess, eitt verk eftir M. Blak og eitt eftir Heðin Z. Davidsen og er hetta verk fyri klaver og teldu.

Síðani spælir Athene Kvartetten. Har leikar Benedikte Thyssen 1. violin, Jun Kikuchi Hansen, 2. violin, Angelika Nielsen, bratsj og Marie Louise Lind, cello. Eisini her eru frumframførslur, m.a. av verki eftir K. Blak.

### African Jazz

Konsert er eisini í Sjónleikarhúsinum klokkan 22:30. Hendan er kanska meira serstøk, ella øðrvísi, enn tað, føroysk oyru vanliga hoyra. Her er tað jazzur við rót í Afrika.

Talan er um Summartónar South Africn Jazzband v/ Kristian Blak. Hetta er ein føllbroytt samanseting av tónleikarum. Á skránni eru verk eftir Dyani, Ibrahim, Dørge, Blak og session við Leivi Thomsen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. vestan fyri Írland fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.



**Í dag:**
Millum eitt hátrýst 1019 hPa. eystan fyri Danmark og eitt lágtrýst sunnan fyri Ísland rekur lýggj luft av landsynningi móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06⁰⁰ – 10/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06⁰⁰ – 10/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 21 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni Seinna kvarter
1. juli Mánin næstur jørðini
3. juli Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juni | 4:28 | 16:56 | 3:28 | 15:56 | 3:43 | 16:11 | 6:28 | 18:56 | 7:28 | 19:56 | 2:43 | 15:11 | 1:43 | 14:11 | 4:43 | 17:11 | 5:43 | 18:11 | 4:13 | 16:41 | 5:28 | 17:56 |
| 1. juli | 5:26 | 17:56 | 4:26 | 16:56 | 4:41 | 17:11 | 7:26 | 19:56 | 8:26 | 20:56 | 3:41 | 16:11 | 2:41 | 15:11 | 5:41 | 18:11 | 6:41 | 19:11 | 5:11 | 17:41 | 6:26 | 18:56 |
| 2. juli | 6:28 | 19:00 | 5:28 | 18:00 | 5:43 | 18:15 | 8:28 | 21:00 | 9:28 | 22:00 | 4:43 | 17:15 | 3:43 | 16:15 | 6:43 | 19:15 | 7:43 | 20:15 | 6:13 | 18:45 | 7:28 | 20:00 |
| 3. juli | 7:31 | 20:02 | 6:31 | 19:02 | 6:46 | 19:17 | 9:31 | 22:02 | 10:31 | 23:02 | 5:46 | 18:17 | 4:46 | 17:17 | 7:46 | 20:17 | 8:46 | 21:17 | 7:16 | 19:47 | 8:31 | 21:02 |
| 4. juli | 8:31 | 21:00 | 7:31 | 20:00 | 7:46 | 20:15 | 10:31 | 23:00 | 11:31 | - | 6:46 | 19:15 | 5:46 | 18:15 | 8:46 | 21:15 | 9:46 | 22:15 | 8:16 | 20:45 | 9:31 | 22:00 |